Janus á donskum

- Janus Djurhuus er avgjørt áhugaverdur hjá øðrum enn føroyingum at lesa um. Hann er ikki bara alheimsligur, hann byggir eisini brýr millum Føroyar og onnur lond, sigur Hanus Kamban, rithøvundur, nú danska útgávan um Janus Djurhuus er komin út

ÚTGÁVA
Turið Kjølbro



Í gjár kom stóra verkið um føroyska skaldið Janus Djurhuus eftir Hanus Kamban út á donskum í tveimum bindum. Kirsten Brix hevur týtt til danskt og Odense Universitetsforlag gevur út.

- Í byrjanini var ætlanin at gera eina minni útgávu á donskum ella onkrum øðrum norðurlendskum máli, men tá samanumkom vísti tað seg ikki bera til, tí pilkaði eg við heildina, datt alt niðurfyri, greiðir Hanus Kamban frá.

Tí komu Hanus Kamban og Kirsten Brix ásamt um, at alt verkið skuldi týðast. Tað eydnaðist rímiliga skjótt og væl at finna eitt forlag, sum vildi geva verkið út á donskum. Odense Universitetsforlag er eitt av størstu forløgunum í Danmark.

Janus gloymdur

Í dag er Janus Djurhuus rættiliga ókendur fyri danir. Tað hevur hann tó ikki altíð verið.

- Tá ið hann var á lívi, var hann eitt sindur kendur, serliga í tríatiárunum og undir krígnum. Hann hevði nógvar vinmenn í Keypmannahavn, har var hann nógv at síggja í býarmyndini og í bløðunum. Nógv skrivaðu um hann, hansara skaldskap, eisini danir. Men nú er hann fullkomiliga gloymdur.

Hanus Kamban metir, at Janus Djurhuus er áhugaverdur uppá nógvar mátar.

- Bókmentasøguliga er hann áhugaverdur, tí hann er fyrsti føroyski veruligi yrkjarin. Síðani er hann áhugaverdur, tí hann var undangongumaður í tí at byggja upp eina føroyska mentan og føroyskt skaldsligt mál. Eisini hevur hann áhuga sum skald. Ein partur av hansara yrkingum eru sum skaldskapur góðar. Tað er sjálvsagt umráðandi, at hann verður týddur rætt. Tíðin er farin frá nógvum av týðingunum, tí máltónin er gamaldags og minnir um yrkjarar, sum livdu fyrst í 19. øld. Tí er neyðugt at týða hann av nýggjum til eitt aktuelt danskt mál, sum sigur nútíðar dananum nakað, sigur Hanus Kamban.

Í ein vissan mun er hetta gjørt í donsku týðingini. Høvundurin og týðarin hava samstarvað við danska yrkjaran, Vagn Steen, ið hevur nakrar áskoðanir um, hvussu skaldskapur verður týddur til danskt.

- Tað hevur avgjørt havt týdning fyri hesa útgávuna. Ein partur av skaldskapinum hjá Janusi Djurhuus er eksistensiellur og er tí áhugaverdar hjá øllum at lesa.

- Tað er upplagt at týða eitt úrval av hesum til nútímans danskt ella svenskt, sigur Hanus Kamban.

Lagt afturat

Verkið um Janus Djurhuus snýr seg ikki bert um skaldið Janus. Tað snýr seg í líka stóran mun um føroyska søgu og mentunarsøgu, um sambandið millum Føroyar og Danmark, Føroyar og Norðurlond, Føroyar og Evropa, og Føroyar og ta klassisku tíðina.

- Á tann hátt meti eg, at hon er áhugaverd hjá lesarum uttan fyri Føroyar. Janus er ikki bara alheimsligur, hann byggir brýr millum Føroyar og onnur lond. Sjálvur las hann grikskan, latínskan, evropeiskan og norðurlendskan skaldskap.

Danska útgávan er eitt sindur øðrvísi enn tann føroyska. Í onkrum føri er lagt afturat, eitt nú um sambandið millum William Heinesen, Jørgen-Frants Jacobsen og Janus Djurhuus. Epilogurin er fullkomiliga skrivaður um til eitt slag av niðurstøðu, har høvundurin staðsetir Janus bókmentasøguliga, umframt at meiri er gjørt við innihaldið í skaldskapi Janusar. Eisini skrivar høvundurin um sjónarmið Janusar um mentan og politikk og hevur sett tey í samband við gongdina í Føroyum frá Heimastýrislógini til í dag, vit hava eina fullveldisrørslu og nógv hóma olju í undirgrundini.

- Eg havi roynt at kannað, um sjónarmiðini hjá Janusi kunnu setast í samband við gongdina, sum hevur verið síðstu hálvu øldina, og um nakað perspektiv er í teimum. Spurningurin er jú, um sjónarmiðini hjá Janusi, sum var humanistur, hava nakað at siga okkum í dag, og tað vil eg avgjørt meta. Hinvegin er Janus ikki einfaldur, heldur er hann fløktur, sigur Hanus Kamban.

Móttøkan

Hanus Kamban hevur arbeitt við Janusi Djurhuus og skaldskapi hansara síðani fyrst í áttatiárunum. Í 1987 fór hann at arbeiða burtur av við at savna og skipa tilfar. Umframt gjørdi hann samrøður við fólk, sum kendu Janus. Í 1991 fór hann undir at skriva handritið til ta fyrstu bókina.

- Milllum 8-10 ár havi eg arbeitt burturav við Janusi, og so løgið tað ljóðar eri eg als ikki troyttur av honum. Tað kemst helst av, at hetta arbeiðið er ikki liðugt enn. Meiri kundi verið skrivað um hann. Og tað er ikki ómøguligt, at eg skrivi meiri um Janus. Skuldi tað verið, hevði tað verðið neyvt vísindaligt, sigur Hanus Kamban.

Føroyska verkið um Janus er væl selt og nógv lisið, men hvat væntast kann av donsku týðingini um Janus, er ilt at meta um, heldur Hanus Kamban.

- Tað kann henda, at hon als ikki verður nevnd, at hon verður sáplað niður, og at hon fær positiva umrøðu í onkrum blaði. Eg veit í grundini als ikki, hvussu hon fer at verða móttikin, sigur Hanus Kamban.

whazzzup!!!
Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Jógvan Andrias Joensen, jaura@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Ein kurur ímóti fordómum

Onki er so natúrligt fyri okkum, sum at vísa samkenslu við øðrum, ið missa slekt, vinir og samstarvsfelagar. Men at bumba og myrða eiga vit ikki at góðtaka. Heldur eiga vit at stuðla og venda øði og frustrasjón til at byggja brýr, leggja lunnar og slóða slóð.

Atsóknin í heyst á ímyndina av vælferðini í vesturheiminum, World Trade Center, og mótálopini á Afganistan aftaná, vísir tíðiliga, at snævurskygni og tørvandi tol ræður í heiminum. Í mongum førum er tað soleiðis, at ert tú uppvaksin í og við vesturlendskari siðvenju, er ilt at skilja tey, sum standa aftanfyri atsóknina og vilja gera seg inn á vælferðarsamfelagið. Samstundis eiga vit at kunna at taka í egnan barm og spyrja: Hvør siðvenja fær vælferðarsamfeløg og framkomnar tjóðir at stuðla USA og Bretland, nú tey sleppa bumbur, matvørur og teppir hvørt um annað oman yvir fólkið í Afganistan?

Tey flestu hava í heyst verið vitni - og dómarar - til eina atsókn, sum fá tordu at hugsa kundi henda. Tó sigur søgan, at fleiri stórir bygningar eru javnaðir við jørðina áðrenn World Trade Center. Søgan vísir eisini, at menniskju hava dripið ósek bæði undan og aftaná ár 0 eftir okkara tíðarrokning.

Er tað ikki júst í hesum føri, sum fleiri vísa á, at vit eiga at vísa størsta varsemi og taka fram tað besta í okkum og á tann hátt vísa styrki!

Er vilji til staðar, er neyðugt at vit steðga á og vísa á aðrar loysnir enn: Eyga fyri eyga siðvenju.

Støðan versnar. Børn og onnur verjuleys líða undir vælferðarvápnum og -tøkni. Fjølmiðlarnir bera okkum tíðindi og vit vita, at hetta er ikki filmur men veruleiki! og alt hetta verður gjørt við hondini á hjartað og orðunum »God bless Amerika«.

Enn er tað soleiðis, at ein og hvør í sínum lag livir í vónini um, at tað ikki má henda einum sjálvum nakað ella nøkrum, sum standa einum nær. Hóast so er, kann alt tos um sjálvsvirði og virðing fyri øðrum ikki hvørva millum háhús.

Eisini vit, sum búgva í Fjal-er á vestlandinum í Noreg hava í heyst verið vitni til atsóknina. Noreg hevur sum limur í Natosamgonguni víst sín fulla stuðul til herferðina móti yvirgangi, men alt fleiri røddir tala at.

Her á leið er ongin, sum tekur undir við atsókníni, heldur ongin av teimum 42 flóttafólkunum úr Afganistan, sum búgva her í kommununi. Eg komi í samband við nøkur í mínum arbeiði, spæli fótbólt saman við fleiri og vit, sum koma í barnagarðin dagliga, hava fingið samband við afganskar familjur við børnum. Tey eru sjálvandi týðuliga merkt av støðuni í heimlandi teirra.

Hvat kunnu vit gera?

Meðan bumburnar regnaðu yvir Afganistan á ST-degnum vóru 500 ungdómar, 13 -19 ár, frá Dale Vidaregåande skule, Fjaler Ungdomsskule og United World College samlaðir til ymisk tiltøk løgd til rættis av næmingum og lærarum í felag.

Tey, sum tosa enskt til dagligt, fáa roynt seg á norskum, og øll, sum ikki tosa eitt skandinaviskt mál, sleppa at royna seg á enskum ella norskum.

Undir paroluni »Skatten inni oss« kundu næmingarnir velja millum 20 ymisk bólkaarbeiði, tey vildu arbeiða við : Út at fiska, ein túr í fjøllini, dansa, gera afrikanskan mat osfr. Í hvørjum bólki skuldu allir skúlanir verða umboðaðir. Á henda hátt fingu næmingar frá 90 ymiskum londum høvið til at vera saman um, tað teimum dámar best og tosa um, hvørjar uttari kreftir hótta tey.

Dagurin endaði við sjónleiki, tónleiki og skemti ført fram av teimum ungu.

Tiltøk sum hetta verða nevnt í lokala tíðindablaðnum og eru við til at mynda prátið við køksborðið og á arbeiðsplássum í eini lítlari kommunu við 3000 íbúgvum.

Ein góður kurur ímóti fordómum.

Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna

Ja!

Sjálvandi vil eg halda Sosialin, fyri einans 400,- kr. ársfjóðringin og sparið 380,- í mun til leysasøluprísin.

n irri aði nar
a ara a ia in fái
aðið f rðir i na.

a n: ____
að r: ____
nr.: ____
r: ____
f n nr: ____
n ir rif : ____

Ókeypis
rð r n
p að
ia rin
rin ar
p a ið

64

Sosialurin
a 7
110 r a n